

## Venables skal hjá McClaren

Tað verður ein royndur og væl dámdur maður, sum skal verða hjálparvenjari hjá enska fótbóltslandsliðnum. Hjálparvenjarin seinnu árini, Steve McLaren, er blivin høvuðsvenjari, og hann skal nú hava fingið fyrrverandi landsliðsvenjaran Terry Venables at hjálpa sær, skriva enskir fjølmiðlar.

Terry Venables sjálvur váttar eisini, at hann skal starvast á enska landsliðnum, hóast hann enn ikki hevur gjørt avtalu við enska fótbóltslandsliðið.

Venables var venjari hjá Onglandi, tá ið landið í 1996 hýsti EM-endaspælinum og kom í hálvfinaluna, og hann verður mettur sum ein tann best umtókti venjarin hjá enska landsliðnum

## Juve-partabørv hækkaðu

Fríggjadagin varð Juvenstus dømt at flyta niður í næstbestu italsku deildina, har felagið skal spæla í minsta lagi eitt ár, men hóast hetta, hækkaði virðið á partabrøvum í Juventus, tá ið keypsskálin í Milano lat upp í gjár. Virkið vaks við 6,8 prosentum.

Ein íløguráðgevi heldur, at orsøkin til hetta er, at marknaðurin hevði væntað eina harðari revsing til Juventus.

- Fleiri høvdu roknað við, at Juventus varð dømt at flyta niður í triðbestu deildina, men revsingin gjørdist ikki so hørð, og hon kann gerast linari, um Juventus kærir hana, sigur ráðgevin við Reuters.

# B36 kann fáa Zico til Føroya




*Eftir framúr góða avrikið á Malta, skal B36 gera arbeiðið liðugt, tá teir mikukvøldið taka ímóti Birkirkara á Tórsvølli í Havn*

**Tað verður ein av teimum heilt stóru í brasilskari fótbóltssøgu, sum verður venjari hjá mótstøðuliðnum, um B36 megnar at spæla seg víðari í Champions League kappingini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast ein ævigur sannleiki í fótbólti er, at komandi dysturin er tann týdningarmesti av øllum, so slepst neyvan undan, at fólkini kring B36 hava hug at hyggja fram móti uppgerðini móti turkiska Fenerbache, sum bíðar eftir at spæla móti vinnaranum av dystinum millum B36 og maltesiska Birkirkara.

Tí við einum 3-0 sigri í skjáttuni skal ganga nógv meira enn illa, um tað ikki skal eydnast B36 at gerast fyrsta føroyska liðið, sum vinnur seg víðari í europeiska meistarakappingini, har veruliga undankappingin fer ígongd tann 26. juli.

### Ítróttur og pengar

At fólk kring B36 hava hug at hyggja fram móti dystinum móti Fenerbache, kemst av fleiri orsøkum. Fyrst og fremst, so er turkiska liðið helst sterkasta felagið, sum hevur vitjað í Føroyum í fleiri ár. GÍ hevði vitjan av Glasgow Rangers fyri nøkrum árum síðani, og í aðrar mátar skal helst leitast aftur vitjanirnar, sum HB hevur havt av eitt nú Atletico Mineiro, Aberdeen og Coventry.

Fíggjarligi vinningurin hjá B36, um teir spæla seg víðari, skal heldur ikki forsmáast, og tí er einki at taka seg aftur í, at spenningurin er sera stórur í árstalsfelagnum.

### Halda seg til setningin

Einki av hesum er tó nakað, sum tað verður tosað hart um í B36, nú seinastu fyrireikingarnar til dystin móti Birkirkara skal spælast.

– Vit hugsa eina og aleina um dystin mikukvøldið. Hóast 3-0 er eitt gott útgangsstøði, so er tað jú áður sæð, at slík úrslit eru vend í Europa-Cup, so vit taka einki sum helst fyri givið. Tvørtur ímóti rokna vit við, at vit hava eina trupla uppgávu at loysa. Á útivølli upplivdu vit ein dyst, har alt riggaði eftir vild hjá okkum, og tað er jú ikki víst, at alt riggar somikið væl eina ferð afturat, sigur Kristjan á Neystabø, sum tekur sær av viðurskiftunum kring besta mansliðið hjá B36.

– Vit skulu sum so ikki longur enn til Danmark og FCK, sum fyri einum tveimum árum síðani tveitti trygga leiðslu burtur í heimadysti móti gerogisku meistarunum. So vit royna at gera okkara arbeiði til lítar. Spælararnir eta ein bita saman í kvøld, og allan dagin í morgin brúka vit til fyrireikingar. Og so er at vóna, at okkara arbeiði er nóg væl gjørt staðfestir Kristjan.

Í B36 hava tey annars alt fólkið tókt til dystin. Bárður H. Joensen hevði leikbann seinast, eftir at hann fekk reytt kort í dystinum móti FC Midtjylland fyri einum ári síðani. Men hann er nú aftur tøkur, og tað sama eru allir hinir spælararnir í hópinum, skilst.

# Tvey føroysk lið í somu kapping

**Eftir at Japan gav avboð og Wales mest sum játtaði at luttaka, áðrenn teir so góvu avboð, eydnaðist tað ikki at fáa annað lið at luttaka í NM fyri U-17 landslið, og so er føroyska U-19 landsliðið áttanda liðið í kappingini**

NM FYRI U-17 LANDSLIÐ
*Jóannes Hansen*

Føroyar fara at luttaka við tveimum landsliðum, tá ið NM fyri U-17 landslið í fótbólti verður í Føroyum í vikuni eftir Ólavsøku.

Umframt U-17 landsliðið, sum hevur tikið lut í hesi kappingini nógvu tey seinatu árini, so fer føroyska U-19 landsliðið eisini at taka lut. At Føroyar luttaka við tveimum liðum kemst av, at tað ikki eydnaðist at fáa nakran annan at vera áttanda luttakaran í kappingini.

Føroyska U-17 liðið er í bólki A saman við Danmark, Finlandi og Íslandi, og Føroyar U-19 eru í bólki við Onglandi, Svøríki og Noregi. U-17 landsliðið luttekur í hesi vikuni í kapping í Aberdeen. U-19 landsliðið er ikki úttikið enn. Teir hava vant nakrar ferðir seinastu tíðina, og í hesi vikuni fara Bill Jacobsen og Heðin Askham, sum eru venjarar, at gera av, hvørjir skulu fáa boð at luttaka í NM kappingini.

Fyrstu dystirnir vera mánadagin 31. juli. Tá skal Føroyar U-17 spæla móti Danmark, og tá skal Føroyar U-19 spæla móti Noregi.

### Tvey avboð

NM kappingin er altíð í fyrstu vikuni av august. Føroyar og hini fimm norðurlondini skiftast um at hýsa kappingini. Harafturat eru tvey onnur lond altíð við. Ofta er Ongland annað landið, og so hava t. d. Wales, Skotland og Holland ofta luttikið.

Hesa ferð var ætlanin, at Japan skuldi taka lut. FSF gjørdi fyri tveimum árum síðani avtalu við japanska fótbóltssambandið, har bæði formaðurin og aðalskrivarin tóku undir við hesum. Eina ferð eftir ársskiftið komu avboð úr Japan. Wales játtaði so at taka lut, men fyri tveimum mánaðum síðani komu avboð úr Wales.

- Vit hava síðani havt samband við so at siga øll tey europeisku fótbóltssambandini, men tað hevur ikki eydnast at fáa nakað annað lið at taka lut. Freistin hevur verið ov stutt, og tað eru nógvar kappingar, sum eru kring um í Europa hesa ársins tíðina, sigur Ísak Mikladal, aðalstjóri í FSF.

Hini fótbóltssambondini eru kunnað um, at føroyska U-19 landsliðið fer at taka lut í kappingini, og nú er tað upp til føroysku U-19 dreingirnar at vísa, at teir kunnu standa seg.